

www.oljan.fo

**Jan Müller** 11 - 10 - 2011

# Dong sleppir elbilunum

Ósemja millum Dong Energy og Better Place-fyritøkuna hevur nú fingið orkufelagið at taka seg burtur úr samstarvinum, sum eftir ætlanini skuldi gerast eitt satt elbilaævintýr í Danmark. Dong Energy og Better Place eiga í felag Petter Place Danmark, men nú eru tey ósamd um fíggingina. Verkætlanin er mett at kosta 770 milliónir krónur, og DONG heldur uppá, at felagið hevur játtað at rinda 200 milliónir krónur av hesum. Men hin eigarin vil vera við, at Dong hevur eisini bundið seg til at lata verkætlanini 370 milliónir krónur í láni. Men tað avsannar Dong. -Tá samstarvið bleiv skipað, bundu vit okkum til at seta 200 milliónir krónur í verkætlanina. Vit hava eisini tingast um møguligar veitarakredittir, men vit hava ikki bundið okkum til nakað í so máta, sigur Torben V. Holm, verkætlararleiðari hjá Dong, við Jyllands-Postin. Blaðið heldur, at ósemjan millum teir báðar eigararnar kann gerast eitt álvarssamt bakkast fyri ætlaninar at fáa nógvar danir at koyra í elbilum.


better place